# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Sjálvandi vita vit, at tað eru fleiri, sum hava roynt seg við miseydnaðum íløgum innan fótbólt, og tann vágin er sjálvandi eisini til staðar her.*

*Heini Zachariassen, nevndarformaður í Fremad-Invest*

# Fram á Føroyar




*Í gjárkvøldið varð staðfest, at hald var í tíðindunum um føroysku yvirtøkuna á Amager. Todi Jónsson hevur saman við øðrum keypt meirilutan av partapeninginum í felagnum*

*tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*



*Heini Zachariassen, sum seinnu árini hevur starvast sum stjóri í Bullguard, er nevndarformaður í føroyska Fremad-Invest*

*mynd: www.bullguard.com*

**Við føroyskum íleggjarum og føroyskum sponsorum verður Fremad Amager ikki bara eitt íløguobjekt. Talan verður veruliga um eitt professionelt føroyskt fótbóltsfelag í Danmark**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann 20. februar kundi vit her á blaðnum skriva, at Todi Jónsson var ávegis eini yvirtøku av danska Fremad Amager.

Hóskvøldið var eykaaðalfundur so hildin í felagnum, og seinni um kvøldið váttaði felagið, at nýggjur eigari hevur yvirtikið meirilutan av partapenginginum í felagnum.

## Føroysk loysn

Tað er partafelagið, Fremad Amager-Invest A/S, sum hevur keypt felagið, og handan felagið standa fleiri føroyingar. Millum íleggjararnar í Fremad Amager-Invest A/S eru Todi Jónsson og føroyska P/F Set, ið Framtaksgrunnurin, Sparikassagrunnurin og Framtaksfelagið Notio eiga.

Nevndarformaður í nýstovnaða felagnum er Heini Zachariassen úr Hoyvík, sum eisini er nevndarlimur í Set, og sum seinnu árini hevur stjórna donsku KT-fyritøkuni Bullguard.

Og hann váttar, at talan er um eina 100% føroyska loysn, nú Fremad Amager er yvirtikið.

– Sjálvandi vita vit, at tað eru fleiri, sum hava roynt seg við miseydnaðum íløgum innan fótbólt, og tann vágin er sjálvandi eisini til staðar her.

– Hinvegin hevur Set ein váðafýsnan íløguprofil, og vit síggja avgjørt stórar møguleikar í konseptinum, sum er sett upp. Og tann partin vilja vit fegnir lýsa meira nágreiniliga á tíðindafundinum týsdagin.

Heini váttar tó, at talan er um eina loysn við føroyskum íleggjarum, og har tríggir føroyskir stuðlar eisini verða knýttir at felagnum. Nevnliga Eik Banki, Atlantic Airways og Sansir. Høvuðsstuðul felagsins verður tó framvegis danska Hanne Nørgaard.

– Saman við stóra navninum, sum Todi Jónsson er – bæði í Føroyum og í Keypmannahavn – og við sterku siðvenjuni, sum Fremad Amager hevur, síggja vit stórar møguleikar í hesum konseptinum.

## Føroyskir útisetar

Sum er, so hevur Fremad Amager tveir føroyskar landsliðsspælarar – Andrew av Fløtum og Tem Hansen - í hópinum. Eisini hava Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør roynt seg í felagnum, og við nýggja eigaraskarðanum er uttan iva væl hugsandi, at talan í framtíðini verður um fleiri føroyskarar spælarar. Ikki minst, tá hugsað verður um, at tað munnu búgva í minsta lagi 2.500 føroyingar á sjálvum Amager, umframt teir mongu, sum búgva í og nærhendis danska høvuðsstaðnum.

Eisini heldur føroyska útisetafelagið, ÍF Føroyar, til á leiðini, og tí er væl hugsandi, at bestu spælararnir her nú í størri mun leita sær størri avbjóðingar innan danska fótbólt.

Ítøkiliga vil Heini Zachariassen tó einki siga um hesar møguleikar.

– Vit hava sjálvandi einki ímóti, um góðir føroyskir fótbóltsspælarar vilja royna seg. Tað eru teir sjálvandi vælkomnir til, er einasta viðmerkingin til hetta.

Todi Jónsson sjálvur vil í løtuni ikki gera viðmerkingar til tíðindini, men vísir til tíðindafundin, sum verður týsdagin.

## Sterkar røtur

Hóast Fremad Amager í dag ikki telist millum tey stóru í Danmark, so er lítið at ivast í, at felagið hevur sterkari røtur enn flest onnur. Ikki minst eru røturnar djúpar innan arbeiðarastættina, áskoðaratalið er væl og virðiliga á hædd við tað, sum fleiri superligufeløg kunnu vísa á.

Men tað eru tó 10 ár síðani, at felagið seinast gjørdi um seg í bestu donsku deildini. Síðani hevur tað onkra ferðina verið heilt nær við, men fíggjarliga fundamentið hevur ikki borið, at uppflytingin støðugt er gloppin av hendi síðani, og tí varð neyðugt at fáa nýggjan kapital til vega. Og hesin hevur so víst seg at vera føroyskur.

## Todi fer at venja mánadagin

Møguleiki fyri føroyskum álopspari í Fremad Amager er til staðar, tá Todi Jónsson mánadagin fer at venja við nýggja felag sínum

Á aðalfundinum varð sambært fundarluttakarunum sagt, at Todi Jónsson ætlar sær at venja við hópinum mánadagin.

Og fyri bold.dk váttar venjari felagsins, Peer F. Hansen, at Todi fer at spæla.

- Hann váttaði fyri mær, at hann er tøkur hjá liðnum, um eg havi tørv á honum. Tað er sjálvandi nakað síðani, at eg sá hann spæla, men eg veit, at hann er ein góður spælari, og gleði eg meg at síggja hann til venjing, sigur